

## Kostnaður

Tórshavnar kommuna ber einans kostnaðin av kommunalu tænastunum. Tænastur, ið avvarandi biðja um frá øðrum enn Tórshavnar kommunu, rinda avvarðandi sjálvi.

Gravarhjálp v/Herman Eysturoy
tel. 511723 • gravarhjalp@gravarhjalp.fo • gravarhjalp.fo

Sólsetur v/Lív Clementsen
tel. 353637 ella 290000 • solsetur@solsetur.fo • solsetur.fo

Árstíðirnar v/Rúnu Lamhauge
tel. 317400 • arstidir@olivant.fo • blomur.fo

Akkuleya v/Eyðrit Ejdesgaard
tel. 318038 • akkuleya@olivant.fo • akkuleya.fo

Blómuhúsið v/Guðrun Patursson og Súnu Mørk
tlf. 513050 • blomuhusid@blomuhusid.fo • blomuhusid.fo

September 2024

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

PERSÓNLIG VIÐURSKIFTI

# Jarðarferð

### TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn
+298 302010
torshavn@torshavn.fo

### UPPLATINGARTÍÐIR

Mánadag-hósdag 9.00-16.00
Fríggjadag 9.00-15.00

Leygardag og sunnudag stongt





PERSÓNLIG VIÐURSKIFTI

# Jarðarferð

**Avvarðandi mugu sum tað fyrsta seta seg í samband við kirkjugarðin / gravaran!**

Biðjast skal um pláss í kirkjugarðinum og tíð til jarðarferð skal avtalast við gravaran.

Tá andlát uttan fyri sjúkrahús er staðfest av lækna, skal deyðaváttan latast kirkjubókarførandi sóknarprestinum í prestagjaldinum. Prestur vegleiðir víðari um, hvussu farast skal fram.

Avvarðandi fáa sjálv til vega kistu og líkverju fyri egnan kostnað. Sjúkrarøktarfrøðingar hjálpa at gera líkið klárt og leggja í kistu.

Er andlátið á sjúkrahúsi, skal avvarðandi venda sær til sjúklingaskrivstovuna, sum vegleiðir um viðkomandi mannagongd.

- Sjúklingaskrivstovan á Landssjúkrahúsinum, tel. 304500
- Suðurstreymoyar eystara prestagjald, tel. 313900
- Suðurstreymoyar vestara prestagjald, tel. 314251
- Kollafjørður hoyrir til Norðurstreymoyar prestagjald, tel. 421214

Er talan um fólk, sum ikki eru limir í fólkakirkjuni, skulu avvarðandi kortini lata kirkjuskrivstovuni deyðaváttan.

## Landssjúkrahúskapellið

Avvarðandi fáa sjálv til vega kistu og líkverju fyri egnan kostnað. Landssjúkrahúsið ger líkið klárt.

Avvarðandi avtala flutning til kirkju ella samkomuhús við føraran av líkvogninum hjá Tórshavnar kommunu. Flutningur við kommunalu líkvognunum er ókeypis. Líkvognur fæst við at ringja á tel. 210570.

## Jarðarferð

Er jarðarferðin úr kirkju, skulu avvarðandi venda sær til prest og avtala tíð fyri jarðarferðini. Prestur boðar kirkjutænarunum frá.

Avvarðandi velja sjálv sálmar ella sangir, ið sungnir verða. Verður ynskt at prenta sanghefti, syrgja avvarðandi sjálv fyri tí.

- Sangarar biðja avvarðandi sjálvi
- Berarar biðja avvarðandi sjálvi
- Pynti til kirkjuna syrgja avvarðandi sjálvi fyri
- Bili at koyra kransar og blómur úr kirkjuni út á kirkjugarðin, syrgja avvarðandi sjálvi fyri Sama mannagongd er galdandi, tá jarðarferðin er úr øðrum samkomuhúsi enn kirkju

## Kirkjugarðskapellið

Tórshavnar kommuna eigur Kirkjugarðskapellið, sum er ókeypis at nýta til jarðarferð hjá øllum í kommununi.

Atgongd til kapellið fæst við at seta seg í samband við gravaran og avtala tíð fyri jarðarferð. Mannagongdin er tann sama, sum undir kirkjuligari jarðarferð. Tó skulu avvarðandi sjálv biðja urguleikara.

## Í kirkjugarðinum

Jarðarferð verður avtalað við gravaran, sum er at hitta á tel. 210570.

Biðjast skal um pláss í kirkjugarðinum og tíð skal avtalast við gravaran.

## Viðkomandi telefonnummur

| | |
|---|---|
| Gravarin í Tórshavnar kommunu | 210570 |
| Sjúklingaskrivstoan á Landssjúkrahúsinum | 304500 |
| Suðurstreymoyar eystara prestagjald | 313900 |
| Suðurstreymoyar vestara prestagjald | 314251 |
| Norðstreymoyar prestagjald | 421214 |